Norðurlendska Ráðharraráðið

# nabo

## – røddir hjá ungum um sosiala inkludering í Føroyum

*"Nógv frítíðarítriv (í Klaksvík) eru um kvøldið, seint um kvøldið, og tá er ongin bussur norður (til Viðareiðis)...og so má man kanska sova í Klaksvík... Tey sum hava bil hugsa ikki um trupulleikan."*

– Genta, Viðareið

# Nabo – røddir frá ungum um sosiala inkludering í Føroyum

*Firouz Gaini*

TemaNord 2019:557

**Nabo – røddir frá ungum um sosiala inkludering í Føroyum**
*Firouz Gaini*

ISBN 978-92-893-6452-2 (PDF)
ISBN 978-92-893-6453-9 (EPUB)
http://dx.doi.org/10.6027/TN2019-557

TemaNord 2019:557
ISSN 0908-6692

Standard: PDF/UA-1
ISO 14289-1

© Norðurlendska ráðharraráðið 2020

**Ansvarsfraskrivelse**
Denne publikation er finansieret af Nordisk Ministerråd. Indholdet afspejler dog ikke nødvendigvis Nordisk Ministerråds synspunkter, holdninger, anskuelser eller anbefalinger.

**Rettigheder og tilladelser**

Dette værk er gjort tilgængeligt i henhold til Creative Commons Attribution 4.0 International License (CC BY 4.0) https://creativecommons.org/licenses/by/4.0

**Oversættelser:** Hvis du oversætter dette værk, bedes du inkludere følgende ansvarsfraskrivelse: Denne oversættelse er ikke produceret af Nordisk Ministerråd og skal ikke betragtes som officiel. Nordisk Ministerråd kan ikke drages til ansvar for oversættelsen eller eventuelle fejl, den måtte indeholde.

**Bearbejdning:** Hvis du bearbejder dette værk, bedes du inkludere følgende ansvarsfraskrivelse sammen med tilskrivelsen af værket: Dette er en bearbejdning af et originalt værk publiceret af Nordisk Ministerråd. Ansvaret for de synspunkter og holdninger, der kommer til udtryk i bearbejdelsen, påhviler udelukkende forfatteren/forfatterne til bearbejdningen. Synspunkter og holdninger i denne bearbejdning er ikke godkendt af Nordisk Ministerråd.

**Tredjepartsindhold:** Nordisk Ministerråd er ikke nødvendigvis ejer af samtlige dele af dette værk. Nordisk Ministerråd kan derfor ikke garantere, at genbrug af tredjepartsindhold ikke udgør en overtrædelse af en tredjeparts ophavsret. Hvis du ønsker at genbruge tredjepartsindhold, bærer du selv ansvaret for enhver overtrædelse af ophavsretten. Du er ansvarlig for at vurdere, om det er nødvendigt at indhente en tilladelse til anvendelse af tredjepartsindhold og i så fald at indhente den nødvendige tilladelse fra ophavsretsindehaveren. Eksempler på tredjepartsindhold inkluderer, men er ikke begrænset til, tabeller, illustrationer og billeder.

**Fotorettigheder (genbrug kræver yderligere tilladelse):**
Alle henvendelser vedrørende rettigheder og licenser skal stiles til:

Nordisk Ministerråd/PUB
Ved Stranden 18
DK-1061 København K
Telefon 33 96 02 00
pub@norden.org

**Det nordiske samarbejde**
*Det nordiske samarbejde* er en af verdens mest omfattende regionale samarbejdsformer. Samarbejdet omfatter Danmark, Finland, Island, Norge og Sverige samt Færøerne, Grønland og Åland.

*Det nordiske samarbejde* er både politisk, økonomisk og kulturelt forankret, og er en vigtig medspiller i det europæiske og internationale samarbejde. Det nordiske fællesskab arbejder for et stærkt Norden i et stærkt Europa.

*Det nordiske samarbejde* ønsker at styrke nordiske og regionale interesser og værdier i en global omverden. Fælles værdier landene imellem er med til at styrke Nordens position som en af verdens mest innovative og konkurrencedygtige regioner.

**Nordisk Ministerråd**
Nordens Hus
Ved Stranden 18
DK-1061 København K
www.norden.org

Download nordiske publikationer på: **www.norden.org/nordpub**

# Innihald


Fororð ....... 7
Takk ....... 9
Um Nabo ....... 11
Samandráttur ....... 13
1. Innleiðsla ....... 15
  1.1 Háttalag og tilfar ....... 15
  1.2 Ungdómsgransking og ungdómspolitikkur í Føroyum ....... 17
2. Virkin luttøka í samfelagnum ....... 21
3. Ávirkan á samfelagsgongdina ....... 23
  3.1 Tilknýti og inklusjón ....... 26
4. Sosial sambond og felagsskapur ....... 29
5. Hvørjum eru ung stolt av í sínum lokalsamfelagi ....... 33
6. Tilmæli ....... 37
Heimildir ....... 39
English summary ....... 41

# Fororð

Ung í Norðurlondum hava sum heild góðar lívsumstøður. Men munirnir eru stórir millum tey sum hava tað gott, og tey sum á ymiskan hátt eru ekskluderað úr samfelagnum. Nógv ung uppliva at tey hava tað gott, og kunna ávirka sín gerandisdag, men samstundis síggja vit avbjóðingar í øllum Norðurlondum, og avbjóðingarnar líkjast í øllum londum. Her finna vit bólkar av ungum, sum ikki kenna seg inkluderað i samfelagið. Tey halda seg ikki verða hoyrd ella tikin álvarsliga, tá ið tey luttaka í almennum tiltøkum. Vit vita eisini at plássið har tey ungu vaksa upp, og har tey búgva, hevur stóran týdning fyri hvørjar møguleikar tey hava, at liva tað lív sum tey vilja. Tann landafrøðisliga støðan ávirkar møguleikarnar hjá teimum ungu, tað vil siga um tey vaksa upp á bygd, í einum miðstórum býi, í einum ikki-priviligeraðum býlingi ella í einum stórbýi undir góðum korum.

Ung eru heterogenir bólkar við ymiskum tørvi. Vit vita at bólkar av ungum hava tørv á serligum stuðli, til dømis ung sum eru í vanda fyri at verða uttan skúla og arbeiði, ung við sálarligum trupulleikum, lgbt-persónar og tarnað. Fyri at vita meir mugu vit práta við tey ungu, lurta á teirra sjónarmið og greina út hvat tey siga. Vaksin mugu lurta eftir ungdómssjónarmiðum og virðismeta tey ungu sum eitt náttúrligt ríkidømi og skilja at ung eru serkøn viðvíkjandi síni egnu lív.

Í verkætlanini Nabo, verður sosial inkludering hjá ungum í Norðurlondum kannað. Nabo kannar hvussu 16–24 ára gomul ungfólk, lýsa møguleikar og forðingar fyri at tey kunna liva tað lív tey ynskja, og hvørjar møguleikar tey hava at ávirka hetta. Eitt inkluderandi samfelag strembar eftir at øll menniskju skulu uppliva seg sum inkluderað í samfelagið, og hava møguleika fyri at ávirka og luttaka í menningini av samfelagnum, undir javnlíkum korum. Í verkætlanini Nabo, hava vit tikið frágreiðingar fram sum vísa, hvussu ung lýsa ymiskar partar av sosialari inkludering í Norðurlondum, og í Føroyum, Grønlandi og Álandi.

Hendan frágreiðing speglar støðuna hjá ungum i Føroyum. Úrslitið vísir at ung sum heild eru nøgd við teirra lív; teirra dagliga virksemi inniheldur útbúgving, ítrótt, venjing og vinir. Ung uttanfyri høvðustaðin eru flytfør (mobil), tey flyta seg um stór landafrøðislig og sosial økir, og eru ofta noydd at ferðast fyri at luttaka í ymiskum frítíðarítrivum og útbúgvingum. Føroyar eru í munandi part eitt smátt og lokalt samfelag, har ung hava sterk bond til heimstaðið; harvið varveita teir ungu føroyingarnir eitt sterkt, kensluborið band til heimstaðið, eisini tá tey flyta; og familjubondini hava stóran týdning fyri samleikan. Havnin líkist meir einum urbaniseraðum stórbýi við innflyting frá ymiskum pørtum av landinum. Tey ungu luttaka ikki nógv í politikki, kortini hava tey álit á, at politikkarir taka klókar avgerðir. Tey hava eisini gott innlit í lokalar politiskar spurningar, tó uttan at sjálvi taka beinleiðis lut. Vegna teimum smáu umstøðum sum Føroyar eyðkennast av, er tað ofta tann sum hevur størst familju sum hevur lokalt, politiskt embæti. Tað er eisini vegna hesar smáu

umstøður at tað kann vera ringt fyri ung, sum á ymiskan hátt bróta móti samfelagsnormunum, at verða viðurkend av tí lokala samfelagnum og verða búgvandi í heimbygdini.

Hendan frágreiðing er framleidd av verkætlanini Nabo í samstarvi við Firouz Gaini sum er professari í antropologi, og ungdómsgranskari vid Fróðskaparsetur Føroya.

Lena Nyberg, generaldirektørur á Myndigheten før ungdoms- och civilsamhællesfrågor (MUCF) í Svøríki.

# Takk

Úrslitini av hesari kanning hava sítt grundarlag í trimum bólkasamrøðum við føroyskan ungdóm, sum undirritaði skipaði fyri á vári 2019. Marita Svartá, granskingarhjálparfólk við tilknýti til Søgu- og Samfelagsdeildina á Fróðskaparsetri Føroya, eigur stóra tøkk fyri hennara sera týðandi stuðul í arbeiðinum við at planleggja og gjøgnumføra samrøðurnar á Viðareiði, í Fuglafirði og í Havn. Uttan hennara holla kunnleika til uppgávur av hesum slag, hevði tað neyvan eydnast mær at fáa datainnsavningararbeiðið so væl úr hondum greitt. Kjartan Sleire, søgufrøðingur, eigur eisini tøkk uppiborna fyri sín stuðul í sambandi við fyrireikingarnar av samrøðunum í Fuglafirði og á Viðareiði.

Annars skal eg hjartaliga takka tykkum ungu – føroyskum kvinnum og monnum á veg inn í vaksnamannatilveruna – fyri at hava givið okkum loyvi til at gera samrøðurnar og til at brúka ríka empiriska tilfarið, ið samrøðurnar umboða, til hesa granskingarverkætlanina. Tað hevur verið sera læruríkt, áhugavert og hugnaligt at lurta eftir tykkum; tað er hugvekjandi og mennandi at práta við tykkum um gerandislív, lokalsamleika, framtíðarætlanir og onnur samfelagsviðurskifti. Eg skal eisini takka rektarum, lærarum og øðrum persónum, sum hava stuðlað mær í granskingararbeiðinum í Føroyum.

# Um Nabo

Nabo – sosiala inkludering teirra ungu í Norðurlondum er ein verkætlan, sum var sett í gongd av Nørrøna ráðharraráðnum undir tí svenska formannaskapinum 2018. Verkætlanin fevnir um tíðarskeiði 2018–2020 og hevur sum mál at vísa á ungdómssjónarmið á sosiala inkludering gjøgnum røddir frá ungum í Norðurlondum. Leiðari av verkætlanani er Jeff Jonsson.

Svenski myndugleikin Myndigheten för ungdoms- och civilsamhällesfrågor framleiðir og spreiðir vitan innan tvey økir, svenskan ungdómspolitikk og politikk fyri tað borgarliga samfelagið. Myndugleikin framleiðir vitan um lívsumstøður hjá ungum innan fleiri økir sum til dømis arbeiði, bústaðarviðurskifti, útbúgving, heilsa, frítíð og ávirkan. Myndugleikin hevur eisini í uppgávu at arbeiða við og tryggja, at ungdómssjónarmiðið mennist í øðrum landsmyndugleikum og at stuðla kommunum í teirra menning av ungdómspolitikki.

Kontakt:
Myndigheten för ungdoms- och civilsamhällesfrågor
Liedbergsgatan 4, Box 206, 351 05 Växjö
info@mucf.se

# Samandráttur

Spurningar um ungdóms-luttøku og inklusjón verða sjáldan havdir á lofti í politiskum og akademiskum kjaki í Føroyum. Í hesari verkætlanini, sum byggir á tríggjar bólkasamrøður (í høvuðsstaðnum, í býi í Eysturoynni og á bygd í Norðuroyggjum) fingu ung eitt gylt høvi at skifta orð um eina røð av týðandi evnum, ið eru við til at lýsa støðuna hjá ungdómi í dag viðvíkjandi rættindum, sosialum lívi og luttøku í lokalsamfelagnum. Tey ungu, serliga tey ið búgva uttan fyri høvuðsstaðarkommununa, hava ein gerandisdag við eyðsýndum flytføri, sum serliga vísir seg í arbeiðs-, skúla- og frítíðar-relateraðari koyring millum bygdir og býir. Netverkini hjá teimum hava eina stóra landafrøðiliga og sosiala vídd, tó tykist tilknýtiskenslan til 'staðið' – heimbygdina – at vera rættiliga sterk og mótstøðufør. Familjubondini tykjast umboða mest týðandi grundarsteinin í lokala samleikanum. Tórshavn er eitt størri og meira samansett pláss við nógvum ungdómum, ið eru fluttir av smáplássum kring alt landið, og býurin kann tískil tykjast at vera ein meira 'staðarleysur' miðdepil við bólkum av fólkum, sum ikki hava serliga nógv samband við hvønn annan. Ung fólk bera boð um eina kenslu av at vera lutfalsliga valdsmikil og ótamd í samskifti við eldri ættarlið, men sera fá ung eru virkin í lokalpolitikki, bæði tá talan er um formligt og óformligt politiskt virksemi. Tey kunnu í fyrstu atløgu tykjast í so óvirkin, men tey eru í veruleikanum sera væl kunnað um politiska landslagið og avgerðargongdina í lokalsamfelagnum. Tey eru, við sínum sinniliga hugburði, avgjørd um, at politiska stættin ikki kann órógva inkluderandi (og javnrættinda) samfelag teirra. Í einum lítlum samfelag við fokus á familjubólkar eru fólk bundin at hvørjum øðrum, og øll vita alt um øll, so at siga, sum er støða, ið gevur ungdóminum eina kenslu av at vera partur av spælinum, sjálvt tá tey tiga og gera lítið um seg í lokalum kjaki. Hinvegin eru tey ungu sera virkin á øðrum pallum í gerandislívinum: skúla/útbúgving, frítíð/ítrótti, arbeiði, osfr. Mítt tilmæli, grundað á føroysku kanningini, kann í stuttum setast upp sum fýra mál:

At allýsa og seta í verk ein barna- og ungdómspolitikk fyri landið, ið skal tryggja bestu umstøðurnar og møguleikarnar fyri ung at vaksa upp og mennast, men eisini at fáa ávirkan á mentanarlig og samfelagslig viðurskifti. Eisini eigur politikkurin at verja veikar (viðbreknar) ungdómsbólkar ímóti samfelagsligari marginalisering og ekskludering.

At skipa fyri at fáa savnað saman og lagt til rættis vitan og hagtøl um ungdóm, ið kann hjálpa okkum at fáa eina neyvari og meira fullkomna mynd av umstøðunum og møguleikunum hjá ungdómi í Føroyum. Strategiskt samstarv millum granskarar, ungdómsfelagsskapir og lokalar politiskar stovnar skal fyriskipast við felags frágreiðingum, seminarum, fundum, osfr.

At stovna eitt fak (skeið) í politiskari luttøku og sosialari inklusjón í framhaldsdeild fólkaskúlans. Fakið skal vera praktiskt, hava føroyska kontekstin í brennideplinum og byggja á úrslit av vísindaligum kanningum. Tað skal eisini hava eitt norðurlendskt sjónarhorn – taka við læru (viðvíkjandi inklusjón av ungdómi) av royndunum, man hevur í grannalondum okkara í dag.

At skapa meira tilfar um og fleiri pallar til ung í almennum miðlum – sjónvarpi, útvarpi, alneti. Her skulu ung úr øllum sosialum bólkum fáa møguleikan til at fortelja sína søgu og at taka lut í orðaskifti við javnaldrar úr øllum landinum. Spurningurin um rættindi og luttøku í samfelagnum skal vera í hásæti.

# 1. Innleiðsla

## 1.1 Háttalag og tilfar

Føroyska verkætlanin umfataði samrøður við tríggjar fokusbólkar við 17 til 23 ára gomlum kvinnum og monnum. Fyrsta samrøðan fór fram seinnapartin mikudagin 22. mai (2019) á skúlanum á Viðareiði. Tríggjar gentur og tríggir dreingir luttóku. Ein persónur var 17 ár, tveir vóru 18 ár, ein var 19 ár, og tveir vóru 20 ár. Síðan var farið til Fuglafjarðar, har skipað var fyri fokusbólka-samrøðu í Mentanarhúsinum mánakvøldið 27. mai. Tríggjar gentur og tveir dreingir luttóku. Ætlanin var at hava seks luttakarar, men eitt avboð kom í síðstu løtu. Ein persónur var 17 ár, tveir vóru 18 ár, ein var 19 ár, og ein var 20 ár. Triðja og seinasta samrøðan fór fram á Glasi í høvuðsstaðnum fyrrapartin hósdagin 6. juni. Tríggjar gentur og tríggir dreingir luttóku. Ein sjeyndi persónur, sum var bjóðaður at vera við, gav avboð. Tveir persónar vóru 17 ár, tveir vóru 18 ár, ein var 20 ár, og tann elsti var 23 ár. Umframt tey ungu, so vóru eg og Marita Svartá, granskingarhjálparfólk, við í øllum samrøðunum. Marita gjørdi praktiska fyrireikingararbeiðið – hon setti seg í samband við og gjørdi avtalur við luttakararnar, hon tosaði við skúlarnar og onnur í lokalsamfelagnum, hon bílegði hóskandi hølir til samrøðurnar, hon gjørdi kaffi/te og keypti smákøkur/tvíflísar, o.s.fr. Samrøðurnar vardu umleið tveir tímar og vóru bandaðar á diktafon.

Vit brúktu svensku vegleiðingina og spurningarnar (‘interview guide’), sum er ætlað øllum empirisku kanningunum í norðurlendsku NABO-verkætlanini. Vegleiðingin er býtt upp í seks høvuðsevni, ið kjakið hjá teimum ungu skal taka støði í. Hóast tvær samrøður fóru fram í skúlastovum, so høvdu skúlarnir sum útbúgvingarstovnar sum so onki við verkætlanina at gera. Ongin ungdómur var noyddur at luttaka í kanningini; øll luttøka var sjálvboðin. Allar samrøðurnar vóru sera áhugaverdar, men tær vóru eisini rættiliga ymiskar. Í øllum fokusbólkunum var *ein* persónur, sum hevði serliga nógv uppá hjartað, og sum hevði drúgvar frásagnir í orðaskiftinum. Tað vísti seg at vera serliga trupult at finna ung í Havn, ið høvdu tíð og hug at binda seg til hesa samtaluna, hóast tað eyðvitað er í høvuðsstaðarøkinum at flest ungfólk hava sína dagligu gongd. Tey bóru seg í fleiri førum undan vegna ov nógvar aðrar avtalur og bindingar.

Plássini, sum eg valdi til hesa kanningina, skuldu umboða (a) eina lítla bygd, (b) ein lítlan bý, og (c) ein størri bý. Ongin ivi var um, at Havnin skuldi vera ‘høvuðsplássið’ í kanningini, men valið av øðrum plássum at hyggja at var ikki sjálvsagt. Her kundu fleiri størri og smærri bygdir havt verið valdar burturúr. Ein ov lítil og avbyrgd bygd hevði tó ikki havt nóg nógvar luttakarar í aldursbólkinum 17–23 ár til fokusbólkin. Ein høvuðsorsøk til at eg tók avgerð um at fara til Fuglafjarðar og Viðareiðis at gera samrøður, var at søgufrøðingurin Kjartan Sleire, sum eg havi havt sera gott granskingarsamstarv við seinastu árini, hevur eitt umfatandi netverk í hesum økinum av landinum. Kjartan er sjálvur ættaður úr Fuglafirði, og hann hevur gjøgnum sítt lærarayrki havt nógv ung úr

Norðuroyggjum sum næmingar. Haraftrat hava vit báðir verið saman um annað (altjóða) granskingarverkætlanararbeiði, sum eisini hevur serstaka kommunu í Norðureysturoynni í brennideplinum. Og tí tyktist hesin landsluturin á ein hátt at vera lættast 'atkomandi', uttan harvið at vera minni áhugaverdur enn nakað annað øki í landinum. Tó kann viðmerkjast, at Fuglafjørður og Viðareiði eru partur av føroyska 'meginøkinum', t.v.s. eru knýtt at vegakervinum sum høvuðsstaðurin er partur av, og tí eru minni avbyrgd enn bygdir og býir í t.d. Sandoynni og Suðuroynni eru. Eisini er skjótt og ómakaleyst at koyra til Klaksvíkar, sum er størsti býurin uttan fyri Havnina. Við øðrum orðum, so hava valdu lokalsamfeløgini nakrar møguleikar t.d. viðvíkjandi pendling til arbeiði og skúla, sum øðrum økjum ikki er unt. Eitt sindur um luttakandi plássini:

Bygdin Viðareiði er norðast á Viðoynni; ein oyggj sum hevur tvær bygdir við tilsamans umleið 600 íbúgvum: Hvannasund (270 íbúgvar) og Viðareiði (340 íbúgvar). Børnini ganga í skúla í bygdini frá 1. til 7. flokk, síðan fara tey til Klaksvíkar at ganga í framhaldsdeild fólkaskúlans. Viðareiði, sum er eitt av elstu búplássum í landinum, liggur í sera náttúruvøkrum umhvørvi. Bygdin hevur nógvar býlingar, sum liggja spjaddir á slætta eiðinum millum Malinsfjall og Villingadalsfjall. Viðareiði er sjálvstøðug kommuna.

Fuglafjørður hevur 1.500 íbúgvar og er egin kommuna (íroknað smáu bygdinar Hellurnar og Kambsdalur). Býurin hevur stóra havn og sera ríkt og fjølbroytt maritimt virksemi – frystuhallir, oljugoymslu, fleiri fiskavirkir, trolvirki, trolarar, osfr. Í Fuglafirði er stórur barnaskúli (umleið 360 næmingar í 1.–10. flokki), og á Kambsdali, sum hoyrir til kommununa, er handilsskúli og studenta- og HF-skeið. Býurin hevur eisini ríkt ítróttar- og mentanarlív, t.d. virksemið í modernaða Mentanarhúsinum.

Tórshavn er høvuðsstaðurin í Føroyum. Býurin liggur í landafrøðiliga miðdepli landsins og hevur verið tingstaður landsins í meira enn túsund ár. Í Tórshavn búgva umleið 16.000 fólk meðan Tórshavnar Kommuna telur á leið 21.500 íbúgvar. Býurin stendur í vøkstri, og nýggir býlingar verða settir á stovn fyri at nøkta bústaðartørvin. Glasir er størsti útbúgvingarstovnurin í landinum, við 1.500 næmingum og 250 starvsfólkum. Flestu næmingarnir ganga á miðnámi og yrkisnámi, men stovnurin bjóðar eisini hægri og víðari-útbúgving á serligum fakøkjum.

**Mynd 1: Føroyakort**




## 1.2 Ungdómsgransking og ungdómspolitikkur í Føroyum

Seinastu árini hava fleiri smærri og størri granskingarverkætlanir sett sjóneykuna á gerandislívið og sosialu og mentanarligu korini hjá børnum og ungdómum í Føroyum. Anne Bamford, professari í list (skapanarevni) og útbúgving, skrivaði í 2012 frágreiðingina 'Arts and Cultural Education in the Faroe Islands' (sum Norðurlandahúsið í Føroyum hevði umbiðið), sum gevur eina neyva støðulýsing av kreativu lærugreinunum í skúlanum og øðrum læringskontekstum, og sum endar við nøkrum tilmælum um hvat kann gerast fyri at menna eitt samfelag, ið gevur skapandi listini hægri tign. Undirritaði (Firouz Gaini) hevur arbeitt nógv við føroyskum ungdómskanningum seinastu tjúgu árini. Í 2008 kom bókin 'Miðlar, mentan og seinmodernitetur – Ein antropologisk lýsing av føroyskum ungdómi', sum er ein stytt og eitt sindur umskrivað útgáva av ph.d ritgerð hansara um ungdómsmentanir í Føroyum, í bókhandlarnar. Sama árið skrivaði eg frágreiðingina 'Barna- og ungdómskanningin – mentan, frítíð og trivnaður', sum Mentamálaráðið hevði bílagt. Frágreiðingin vísir, hvussu børn í 3. og 7. flokki í føroyskum skúlum sjálvi lýsa sín gerandisdag og sína samfelagsstøðu.

Mentamálaráðið setti verkætlanina ígongd fyri at savna (nýggja) vitan saman um børn í Føroyum, sum skuldi virka sum grundarlag undir nýggjum formligum føroyskum barna- og ungdómspolitikki. Hesin politikkurin varð tó ongantíð orðaður. Og kanningin, ið týðiliga vísti at yngru ættarliðini ikki kenna seg vird og hoyrd sum sjálvstøðugir borgarar í fólkaræðiligum landi, fekk heldur ikki nakað framhald, sum annars hevði ligið í kortunum. Seinni havi eg gjørt fleiri landsumfatandi skúlaspurnakanningar, sum serliga hava varpað ljós á evni sum gerandislív, familju, frítíð, mentan, heilsu og framtíðarætlanir. Í 2010 kom til dømis norðurlendska frágreiðingin 'The Nordic Youth Research' (Jón Sigfússon á University of Reykjavik samskipaði arbeiðið), sum greinar støðuna hjá teimum 16–19 ára gomlu í Norðurlondum, íroknað Føroyum. Líknandi kanning, sum tó einans hevði føroyska og íslendska luttøku, varð gjørd í 2011–2012. Føroysku úrslitini (1.500 luttakarar) vórðu almannakunngjørd í frágreiðingin 'Youth in the Faroe Islands 2012', sum eg skrivaði.

Seinastu árini havi eg arbeitt við kanningum, ið hyggja nærri at framtíðarætlanunum hjá føroyskum ungdómi, t.d. í nýggju vísindaligu greinini 'Altered Islands: Young Faroe Islanders' Future Landscapes' (Suomen Antropologi, 2018). Erika A. Hayfield, samfelagsgranskari á Fróðskaparsetri Føroya, hevur eisini hugt at føroyska ungdóminum og framtíðarmyndum hansara, serliga í mun til spurningar um migratión og flytføri (mobilitet), í sínari gransking. Nøkur úrslit eru at finna í grein hennara 'Exploring transnational realities in the lives of Faroese youngsters' (Nordic Journal of Migration Research, 2017). Føroyar hava eisini í nógv ár luttikið í kanningini 'The European School Survey Project on Alcohol and Other Drugs' (ESPAD), sum serliga kannar tubbaks og rúsdrekka/rúsevna nýtsluna hjá 15–16 ára gomlum skúlaungdómi. Pál Weihe, yvirlækni, hevur staðið fyri føroysku kanningunum. Viðvíkjandi sosialari inklusjón og (samfelags-) luttøku er, sum sæst, lítið av tilfari úr Føroyum.

**Mynd 2. Fólkapyramida – Føroyar. Hagstova Føroya**



Føroyar hava ongan landspolitikk fyri børn og ung, men í kommunalum høpi eru dømi um ungdómspolitiskar viðtøkur og raðfestingar, hvørs aðalmál tað er at geva ungdóminum eina sterkari støðu hvat fólkaræðisligari luttøku og mentanarligari viðurkenning viðvíkur. Klaksvíkar Kommuna var helst tann fyrsta av teimum stóru kommununum, sum veruliga setti børn og ung á breddan, og arbeiðsskjalið 'Barna- og Ungdómsvirðir' hjá kommuni er eitt slag av ungdómspolitiskum manifesti, sum skal vísa, at býráðið ynskir at ganga á odda á hesum frontinum. Undir yvirskriftini Visjón stendur til dømis:

> Í Klaksvíkar kommunu hava øll børn og ung rætt til eitt gott lív.
>
> Klaksvíkar kommuna vil virka fyri einum tryggum og mennandi umhvørvi hjá børnum og ungum, har dentur verður lagdur á trivnað, opinleika og samstarv. Í Klaksvíkar kommunu skulu børn og ung hava møguleika fyri ávirkan á egið barna- og ungdómslív.

Tað er tó enn langt á mál, bæði í Klaksvík og aðrastaðni í landinum, áðrenn man kann siga at man hevur gjørt ein ungdómspolitikk, ið nágreiniliga forklárar hvørji tiltøk og hvørjar skipanir skulu setast í verk fyri at fremja politikkin í verki. Tórshavnar kommuna útgav í 2005 eitt álit um ung, sum hevði grundarlag í spurnakanning, ið ein serligur arbeiðsbólkur varð settur at fyrireika. Býráðið gav bólkinum hesa uppgávuna: 'at gera niðurstøður og tilmæli, sum kunnu vera støði undir arbeiðinum at fremja eina virkna barna- og ungdómsmentan, ið kann fyribyrgja mistrivnaði í uppvøkstri og samstundis stuðla upp undir menningina hjá børnum og ungum'. Hetta var eitt jaligt framtak, ið tó ikki ger nakað serligt burturúr spurninginum um luttøku og inklusjón. Álitið hevur eina røð av tilmælum, til dømis at opna fleiri ungdómsklubbar, ungdómscafé og dans til ung undir 18 ár, fleiri tilboð um frálæru í skapandi listagreinum, og nýggj og betri útbúgvingarpolitisk mál fyri framheildsdeild fólkaskúlans í Tórshavnar kommunu. Hyggur tú at álitum, sum Mentamálaráðið hevur framleitt og lagt út á heimasíðu sínari, so finnur tú 'Mentan og menning' (mentanarpolitisk ætlan, 2002), 'Álit um føroyskan málpolitikk' (2008), ´Álit um føroyskar miðlar' (2011), 'Happing í fólkaskúlanum' (2015), 'Tilmæli um 10. flokk' (2017), osfr. Í 2007 kom stóra og nógv umtalaða frágreiðingin 'Visjón 2015: Mál og vegir' hjá Løgmansskrivstovuni, sum telur 250 blaðsíður. Í frágreiðingini stendur m.a. um ung, at

> 'íverksetaramentanin verður løgd í skúlaungdómin frá barnsbeini [...] Børn og ung hava møguleika at ganga á mentanarskúla og ítróttarháskúla, samstundis sum ítróttar- og rørsludeplarnir kring landið eggja okkum øllum til at vera virkin og sostatt styrkja fólkaheilsuna [...] Harumframt er eitt barna- og ungdómsráð, ið tryggjar børnum og ungum bestu kor og umstøður at vaksa upp og mennast [...] Átøk sum til dømis grønir skúlar og tílíkt skulu fremjast fyri at stimbra tilvitanina til náttúru og umhvørvi millum børn og ung [...] Mentamálaráðið skal *orða ein mentanarpolitikk* fyri børn og ung [...] og *rættindini hjá børnum og ungum* skulu styrkjast [...] Barna- og ungdómsgransking skal bæði lýsa umstøðurnar sum heild, serstøk viðurskifti, og gera tað gjørligt at fylgja gongdini, eisini samanborið við støðuna í grannalondunum [...] Eitt barna- og ungdómspolitiskt heildarútspæl fevnir sera víða – og hevur antin beinleiðis ella óbeinleiðis við mest sum allar tættir í samfelagnum at gera [...] Aðalmálið við *barna- og ungdómspolitikkinum* er, at øll børn og ung skulu hava somu rættindi og somu møguleikar, sama hvørjar fortreytir og umstøður tey annars hava [...] Landsstýrið eigur at seta sær sum mál, at allir sektorar skulu hava orðað uppskot til barna- og ungdómspolitikk á sínum øki innan eina ávísa tíðarfreist [...] Eitt *barna- og ungdómsráð* eigur at vera sett á stovn, so at hesin samfelagspartur, ið ikki hevur møguleika at vera politiskt virkin ella á annan hátt er myndugur, kann vera hoyrdur' (mín áherðsla)

Hóast hetta var partur av visjón 2015, og vit nú eru komin til endan av árinum 2019, so má ásannast, at sera lítið av hesi framsøknu nýhugsan er framt í verki í Føroyum. Visjón 2015 er farin í gloymskuna. Hetta var fyrstu ferð at arbeiðsbólkar við serfrøðingum av álvara høvdu sett ungdómspolitikkin í brennidepilin. Ongin hevur tikið hendan tráðin uppaftur – í øllum førum ikki enn. Spurningar um ung eru ofta uppi at venda í politiskum kjaki, men tá er tað vanliga um skúla og læring, mentanar- og frítíðarlív, likam og heilsu, o.l., og rættiliga sjáldan um ungdóm sum luttakara í samfelagnum.

Barnabati (sjálvstøðugur føroyskur barnarættindafelagsskapur, sum minnir um 'Save the Children') hevur seinastu árini havt nógvar áhugaverdar verkætlanir um hendi, t.d. eina vælvitjaða telefon-ráðgeving til børn og ung. Felagsskapurin hevur seinastu árini miðvíst arbeitt fyri at fremja tiltøk innlendis ('implementering'), ið gera, at tað føroyska samfelagið livir upp til krøvini, ið barnarættindasáttmálin hjá ST hevur ásett. Barnabati, sum eisini hevur framleitt upplýsandi undirvísingartilfar á føroyskum til fólkaskúlan, roynir at betra um almennu vitanina um barnarættindi í Føroyum (Gaini 2009).

Føroya Ungdómsráð (FUR, stovnað í 1984) er paraplyfelagsskapur, sum umboðar 22 limafeløg og 29 lokalfeløg (51 feløg og uml. 4.000 børn og ung tilsamans), hevur til endamáls at viðgera spurningar, ið viðvíkja føroyskum ungdómi, skapa áhuga fyri ungdómsmálum, eggja ungdóminum at taka lut í og fáa ávirkan á samfelagið, menna samstarvið og sínámillum fatan millum føroyskan ungdóm, osfr. Umframt politisku ungmannafeløgini, so eru skótafeløg, tónleikafeløg, listafeløg, Blái Krossur, Frelsunarherurin, og onnur feløg í limaskaranum hjá FUR. Nógv áhugavert virksemi fer fram í hesum landsumfatandi barna- og ungdómsfelagsskapunum, men spurningar um luttøku og sosiala inklusjón fylla lutfalsliga lítið í arbeiðinum. Her eru vit helst eftirbátur í Norðurlondum, uttan at vit tykjast at geva okkum far um trupulleikan.

**Mynd 3. Fólkatalið í Føroyum. Hagstova Føroya**



# 2. Virkin luttøka í samfelagnum

Ung í Føroyum eru sum heild væl nøgd við sína støðu í heiminum og lokalsamfelagnum. Tey flestu hava tað, eg vil kalla ein rættiliga virknan gerandisdag við skúla, arbeiði og fjølbroyttum sosialum virksemi, ið tey trívast við (og í grundini sjálvi í stóran mun hava valt), hóast tað eyðvitað viðhvørt kann vera trupult at fáa alt at ganga upp í eina hægri eind. Ein sera prátingarsamur 20-ára gamal drongur úr Fuglafirði, sum gongur í skúla í Klaksvík, fortelur at hann arbeiðir nógv á lokala fiskavirkinum í vikuskiftunum (upp til 10–12 tímar um dagin), og gerandisdagar annars brúkar nógva tíð at gera skúlating, venja (fitness) og vera saman við vinfólki. Haraftrat, sigur hann, tekur hann viðhvørt eykavaktir á fiskavirkinum aftaná skúlatíð. Rógving fer við bróðurpartinum av frítíðini hjá einari gentu úr sama býi í Norðureysturoynni. Hetta várið hevur hon brúkt í minsta lagi tveir tímar um dagin (6–7 dagar um vikuna) til rógving. Haraftrat venur hon (fitness) næstan hvønn dag. Og sum um tað ikki var nóg mikið, so fáa vit eisini at vita, at hon arbeiðir á fiskavirking í øðrum býi í Eysturoynni. Venjing í vælútgjørdum fitness-venjingarhølum hevur veruliga vundið uppá seg millum ung; hetta er nakað ið rættiliga nógv ung úr øllum landinum siga seg fáast við um kvøldarnar. Ein onnur genta úr Fuglafirði, sum hoyrir til hendan 'fitness-bólkin', arbeiðir ofta á barr í Havn í vikuskiftunum. Henni dámar eisini væl at vera í býnum í Havn saman við vinum í frítíðini.

Ein drongur av Viðareiði, sum arbeiðir í Klaksvík og hevur gentu í Havn, er eisini íðin luttakari í kappróðraumhvørvinum. Hann fortelur, at hann hevur róð í Klaksvík góð fýra ár, og at tað sjáldan gongur dagur har hann ikki treystliga situr við ár í hond. Eg havi 'eitt sindur av tíð til skúlatingini', sigur hann, og fær tað at ljóða sum um, at talan er um nakað minni enn tað, ið tørvur er á. Ein 20-ára gomul genta av Viðareiði, sum gongur á miðnámi í Kambsdali, fortelur at hon brúkar nógva tíð í Missiónshúsinum í bygdini í vikuskiftunum. Hon hoyrir við øðrum orðum til tann samansetta bólkin av føroyskum ungdómum, sum hevur tilknýti til ein kirkju/samkomufelagsskap, ið hevur ymisk reglulig tiltøk til ung og vaksin. Ein onnur genta av Viðareiði, sum er 17-ára gomul og gongur á miðnámi í Kambsdali, brúkar nógva (frí)tíð til síni stóru áhugamál: tónleik og sjónleik. Hon er ungur spíri í mentanarumhvørvinum í Klaksvík, har hon bæði spælir í hornorkestrinum og sjónleikarafelagnum hjá býnum. Eins og nógv onnur ung, ið ikki búgva í høvuðsstaðnum, so ferðast hon nógv millum bygdir og býir í sínum gerandisdegi. Sjónarmiðini hjá børnum og ungdómi eru áhugaverd og neyðug í samfelagsgransking, sigur bretski granskarin Pat Thomson,

> 'precisely because they offer specific and unique insights – about their everyday lives…the omission of these perspectives can easily lead to researchers making interpretations and representations that are very short-sighted and which miss the point' (2008: 1)

Í Havn hoyra vit 23-ára gamla kvinnu, sum er undir útbúgving á Glasi, fortelja um sín gerandisdag. Hon gongur ikki til ítrótt, men venur javnan í Burn (fitness). Hon er suðuroyingur og sigldi við trolara, áðrenn hon flutti til Havnar at ganga í skúla fyri einum ári síðani. Hon arbeiðir ikki, tí hon heldur at tað kann órógva skúlagongdina. Hon hoyrir til ein evarska lítlan bólk av føroyskum kvinnum, sum hevur arbeitt í fiskivinnuni á sjónum. Henni dámdi sera væl lívið á sjónum. Vit hoyra eisini um 20-ára gamlan drong, sum eisini er undir útbúgving, men sum arbeiðir rættiliga nógv. 'Eg arbeiði nógv', sigur hann, 'men eg havi als ikki tíð at brúka pengarnar'. Hann sigur seg sjáldan hava stundir at gera skúlating. Haraftrat gongur hann til fótbólt og hondbólt. Dagarnir eru langir, sigur hann, og vanliga eru 4–5 tímar at sova í um náttina. Hann saknar viðhvørt at hava eitt sindur meira av tíð til sín sjálvs. Næstan øll, í Havn eins og aðrastaðni, hava arbeiði við síðuna av skúlanum. Meirlutin av ungdóminum sigur, at tað mesta av tí hann ynskir at gera, kann hann gera. Hann saknar við øðrum orðum ikki tað, sum ikki er til taks. Serliga í Havn og á Viðareiði eru tey væl nøgd, meðan tey ungu í Fuglafirði, (sambært nøgdsemis-talvunum aftast) eru eitt sindur meira ónøgd. Tey ungu í Fuglafirði siga, at nógv av tí, sum tey høvdu ynskt at tey kundu gjørt, í løtuni ikki er í boði í heimstaðnum. Her er tað serliga frítíðarvirksemi, ið tey ungu hava í tonkunum.

Tað er umráðandi at lurta eftir børnum og ungdómum fyri at fáa eina góða heildarmynd av gerandislívi og mentan teirra. Í 1980'unum fór man í grannalondum okkara at tosa um børn sum 'serfrøðingar í egnum lívi' í politiskum og akademiskum kjaki. Í Danmark tosaðu politikarar t.d. um hvussu teir kundu menna 'medborgerskab' hjá børnum í nýggjum familjupolitikki (í 1992 kom t.d. frágreiðingin 'Lyt til børn! Om børns deltagelse, medbestemmelse og medansvar i samfundslivet'). Tað gekk tó ikki long tíð innan hugurin at lurta eftir røddini hjá børnum hvarv, og arbeiðið fyri at stimbra luttøku og inklusjón í ungdómsættarliðnum fór tíverri sama veg (Grumløse 2017: 141–142).

# 3. Ávirkan á samfelagsgongdina

Tey ungu, sum vit hava prátað við, kenna seg viðurkend, inkluderað og fræls í sínum lokalsamfelagi. Tað er ongin ungdómur í kanningini, sum sigur seg ikki hava lutfalsliga stóra ávirkan á tær avgerðir, sum verða tiknar heima við hús, til dømis um hvørjum borðreitt verður við (døgurða) ella um hvat fyri nýtt innbúgv ið skal keypast til stovuna. 'Eg kann gera alt sum eg vil, næstan', sigur ein drongur úr Fuglafirði við einum smíli, 'uttan at brenna húsini niður'. Ein kvinna í Havn tekur tráðin upp tá hon eitt sindur skemtandi sigur: 'haldi at eg bestemmi meira enn mamma' har heima. Og, leggur hon aftrat, pápin er eitt sindur strangur, men mamman, sum var sera ung, tá hon átti dótturina, 'hon sigur bara ja og amen'. Mamman 'hevur altíð verið øgiliga lagalig' og unga kvinnan hevur tískil havt 'øgiliga fríar teymar'. Ein onnur ung kvinna í Havn sigur, at heimið í grundini er 'staðið har eg føli at eg havi mest rætt til og møguleika fyri at taka avgerðir'. Hon verður tikin uppá ráð og kennir seg inkluderaða í húsinum. Øll tey ungu í kanningini siga seg hava sera fríar teymar heima, eyðsæð, serliga eftir at tey vóru fylt 18 ár. Ein ungur fuglfirðingur fortelur, at 'man tekur atlit til hini fólkini' í húskinum, so 'tað er nokkso demokratiskt...' Ein ungur maður av Viðareiði sigur nakað tað sama: 'tað er eisini demokratiskt hjá okkum...tá man er blivin vaksin, bestemmar man sjálvur...tað er ikki nakað problem'. Hetta er áhugavert og ikki sjálvsagt, og sigur nakað um mentan og familjulív í Føroyum í dag.

> 'Given that young people are invariably marginalised within the wider society [...] empirical research on young people provides an opportunity to increase our understanding of their lives and in some situations to contribute to academic or public debates which play a part in social constructions of youth' (Valentine et al 1998: 23)

Tá kjakið snýr seg um lokaldemokrati og ávirkan, so verða tey ungu eitt sindur afturhaldandi og í iva um, hvat tey skulu siga. Tey hava grundleggjandi álit á sínum lokalpolitikarum og á politisku skipanini, og tey flestu meta ikki at áhugamálini hjá ungdóminum eru fyri vanbýti, hóast ungdómslívið sjáldan eru í fokus í politiska orðadráttinum. Tá tosað verður um ítøkilig mál, til dømis um ein nýggjan veg ella um trupulleikar av larmi á keiøkinum, so vakna tey ungu og vísa seg at hava gott innlit í nýggjastu politisku semjurnar og ósemjurnar í lokalsamfelagnum. Tá tey skulu royna at ávirka eina politiska avgerð í lokalsamfelagnum, so siga tey flestu ungu, at tey velja at brúka óformligar vegir at fáa sín boðskap út til rætta viðkomandi, til dømis við at tosa við ein vaksnan persón í familjuni, ið hevur tætt samband við lokalpolitikararnar. Fleiri ung nevna eisini lívligar politiskar kjakbólkar á sosialu miðlunum sum pallar, ið opna fyri einum samskifti við lokalpolitikarar. Sum heild, so er onki beinleiðis og skipað samband millum ungdómin og politisku stovnarnar í lokalsamfelagnum.

Á nøkrum fólkaskúlum í landinum eru vælvirkandi næmingaráð, sum vara av áhugamálunum hjá næmingum; tey arbeiða fyri at verja áhugamálini og skúlapolitisku ynskini hjá ungdóminum innan skúlagátt. Í Løgtingslóg um fólkaskúlan (lóg nr. 125 frá 20. juni 1997) lesa vit í §2 stk.3 at '...Hann skal búgva næmingarnar til innlivan, samavgerð, samábyrgd, rættindi og skyldur í einum *fólkaræðisligum samfelag*. Undirvísing og gerandislív skúlans eiga at vera grundað á andsfrælsi, tollyndi, javnvirði og fólkaræði' (mín áherðsla).

Ein genta av Viðareiði hevur nakrar áhugaverdar eygleiðingar og viðmerkingar: 'Tann sum verður valdur inn í kommunustýrið', sigur hon róliga, 'er ofta tann sum hevur størstu familjuna...kennir nógv fólk og sleppa so inn...og tá er tað kanska ikki akkurát, tí at man dugir so væl, men meira tí at man hevur stóra familju...' Tey ungu viðganga, at tey ikki gera serliga nógv fyri at fáa ávirkan, men tey kunnu øll nevna dømi um politiskar avgerðir, sum fólk í nærumhvørvinum hava verið ónøgd við. Tey kenna til undirskrifta-innsavningar og onnur mótmælisátøk, hvørs endamál tað hevur verið at broyta ella at steðga umstríddum verkætlanum, sum hava verið í umbúna. 'Um man kennir onkran í kommununi', sigur ein drongur úr Fuglafirði, 'so kann man koma við uppskotum, bara privat, um hvat ið skal gerast'. Hann heldur, at tað er sera lætt at fáa samband við lokalpolitikarar, um man hevur nakað at fortelja teimum.

Í fakinum samfelagsfrøði í miðnámsskúlanum, leggur hann aftrat, hava tey tosað nógv um, hvussu ung kunnu fáa betri innlit í lokalpolitisk viðurskifti, men eisini um, hvussu ung kunnu brúka demokratiskar arbeiðshættir at leggja trýst á kommununa, tá okkurt átaluvert er í umbúna. 'Fólk eru bangin fyri, at Fuglafjørður bara verður átt av Havsbrún', sigur hann ósmæðin. Havsbrún er stór fyritøka, sum framleiðir fiskamjøl, lýsi og alifóður til føroyska og altjóða marknaðin. Tey ungu siga seg eisini brúka alnetið og sosialar miðlar til at fylgja við; til at fáa nýggjastu tíðindini um politisk mál og átøk, bæði lokalt og á landsstigi. 'Fólk kjakast nógv um lokal viðurskifti á Facebook', fortelja ung av Viðareiði. Ein genta sigur, at 'ung ikki eru líka engageraði sum eldri fólk' í politiskum kjaki. Tey hava óansæð nógvar meiningar um tað, sum gongur fyri seg í lokalsamfelagnum, og um hvørjar broytingar tey halda vera neyðugar at gera fyri at fáa eina burðardygga framtíð á staðnum.

Í samandráttinum av føroysku úrslitunum av norðurlendskari frágreiðing um ung og framtíðartankar (ritstjórar: Karlsdóttir og Jungsberg 2015), eru hesi seks evnini tikin fram:

> The youth generation is generally optimistic about the prospects of the Faroe Islands as regards educational and working opportunities, economic and political development, and family and welfare policies.
>
> The youth generation envision a more multicultural society with new ethnic, religious, cultural and social groups living together. This will also change the family structure.
>
> The youth generation envision a more urbanized and centralized society with sophisticated physical infrastructure within the country as well as a fast and modern connection to neighbouring countries.
>
> The youth generation envision a more technologically advanced society with better computerized equipment at schools and other societal institutions. We will see side effects of the digital everyday life: social and psychological distress as a result of the exaggerated use of digital media.

The youth generation envision a society that might well be affected by climate change and global warming, but they do not expect any radical changes in the near future. It is veiled in unanswered questions.

The youth generation envision a society that they would like to return to in case they move away to foreign countries for shorter or longer periods of time. They don't expect any drastic population decline within the near future.

Tey ungu vita rímiliga nógv um tað, sum gongur fyri seg í grannabygdunum og -kommunum, og tey duga at síggja, hvussu broytingar í øðrum bygdum og býum kunnu ávirka teirra egna heimsstað. Ein genta av Viðareiði fortelur um handilin í bygdini: 'Handilin her lukkaði á heysti 2017...tað er øgiliga keðiligt at man ikki líka kann renna oman í handilin at keypa...man hittist meira tá...kom saman við viðingum...nærmasti handil er í (Hvanna-)Sundi nú...' Ung úr Fuglafirði fortelja líknandi søgur, men í Havn er øðrvísi. Ein drongur úr Fuglafirði sigur, at tey, sum búgva í Fuglafirði ('tað er okkara bygd'), mugu fáa ávirkan á tað, 'sum hendir her', men, leggur hann aftrat, man má ikki einans hugsa um seg sjálvan, um egnan fyrimun. Ein genta úr Fuglafirði fortelur um ein trupulleika, tey hava í gøtuni har hon býr: 'internetið hjá okkum er sera ringt', sigur hon, 'vit hava klagað í fleiri ár...so byrja tey at gera nøkur ting...so steðga tey aftur...okkurt er galið við káplunum...' Fólk eru sum heild sera tolin, og rópa sjáldan serliga hart, tá tey skulu vísa sína ónøgd. Hetta sæst aftur í øllum landinum.

**Mynd 4. Pendling í Føroyum. Manntal**




Kelda: Fólkateljingin 2011

Eitt annað, sum nógv eru eitt sindur ónøgd við, er bussleiðina. Tey ið taka bussin í skúla ella til arbeiðis vísa á, at ov fáar fráferðir eru, og at tað tískil ofta er trupult at sleppa avstað ella heimaftur til tíðina. 'Nógv frítíðarítriv (í Klaksvík) eru um kvøldið, seint um kvøldið', sigur ein genta av Viðareiði, 'og tá er ongin bussur norður (til Viðareiðis)...og so má man kanska sova í Klaksvík...' Tey sum koyra bil hugsa ikki um hendan trupulleikan, men tey, sum brúka bussin, eru ónøgd við bussleiðina, sigur gentan, 'men ongin hevur kontaktað Strandfaraskip Landsins (sum rekur rutuna)'. Í onkrum bygdum í Eysturoynni hava fólk skipað fyri felagskoyring í bili, fyri at sleppa frá at bíða eftir bussinum, sum ikki kemur tá

man hevur brúk fyri honum, men sjálvandi eisini fyri at sleppa frá at koyra í næstan tómum bilum millum bygdir og býir. Sera nógv ung eru bileigarar (um tey eru fylt 18 ár) ella hava atgongd til bil gjøgnum familjuna og vinabólkin, og tí gerst røddin hjá teimum ið eru ónøgd við (almennu) samferðsluni rættiliga veik. Eitt annað evni, sum var uppi at venda, bæði í Havn og á bygd, er stóra bústaðarneyðin, sum serliga rakar ung og ung vaksin, sum ikki hava eina høga (stabila) inntøku. Fleiri ung tosaðu um tann stóra tørvin á at byggja modernaðar íbúðir til ung og lesandi.  Tey ávara um at ung kunnu noyðast at flyta burtur frá heimstaðnum vegna ótolandi støðuna á bústaðarmarknaðinum.

**Mynd 5. Framtíðarbústaður. 'Ur frágreiðingini 'Hvat er tað, sum dregur?'**




## 3.1 Tilknýti og inklusjón

Tey ungu í kanningini hjá okkum hava eitt sterkt tilknýti til staðið, har tey eru vaksin upp og búgva. Í Havn eru tó nógv ung, sum hava røtur aðrastaðni í landinum. Sum høvuðsstaður er Tórshavn ein býur við sera nógvum tilflytarum úr øllum landslutum og oyggjum. Havnin er eisini tað einasta plássið í landinum, har tú ikki hevur yvirlit yvir allar familjur og bólkar í býnum. Her kann man vera eitt sindur ósjónligur (anonymur), um man ynskir tað. Uttan fyri Havnina eru familjubondini tættari, og sambandið við gomlu bygdamentanina sterkari. Eisini er sosiala 'eftirlitið' sera týðiligt – øll vita hvat øll gera. Hóast tey ikki siga tað beinleiðis í samrøðunum, so tykist hetta at gera, at ung á bygd seta sær sjálvum avmarkingar við tí fyri eyga ikki at koma í ringt ljós, eftirsum tey ynskja at varðveita eitt gott samskifti við fólk í lokalsamfelagnum. Ein genta úr Fuglafirði fortelur, at hon hevur eina vinkonu, sum kennir avleiðingarnar av at hava traðkað við síðuna av í lítlum samfelag. Vinkonan hevur gjørt nøkur býtt ting fyrr, sigur hon, og nú fær hon ikki arbeiði, tí 'fólk í Fuglafirði vita, hvør hon er…og fólk slatra…' Tey ungu eru

samd í, at tað er vandi fyri at verða útihýstur úr felagsskapinum, um man av onkrari orsøk hevur fingið ringt orð á seg. Og hetta er trupult at sleppa av við, tí fólk minnast og ørminnast. Um ávísir bólkar av ungdómum kenna seg útihýstar, so er eisini vandi fyri at grøvin millum ungdómsbólkar gerst djúpari.

> 'Omfattende marginalisering av ungdomsgrupperinger, enten det dreier seg om kjønn, seksuell legning, etnisk-religiøse forhold eller sosial klasse, vil på lengre sikt kunne skape uforsonlige fronter mellom ungdom og fremme fordommer og diskriminering [...] Hvis samfunnsutviklingen bidrar til at utsatte grupper blant unge blir isolerte og sosialt stigmatiserte, kan det bare motvirkes ved å tilrettelegge for økt deltakelse og økt medvirkning' (Aagre 2014: 85–86).

Tey ungu búgva fyri tað mesta heima hjá foreldrunum, tí tað er ein bílig loysn, men eisini sum ein avleiðing av at ov fáar alternativar bústaðarloysnir eru í lokalsamfelagnum. Tey flestu hava stórt familjunetverk og hava tilknýti til ymsar sosialar bólkar gjøgnum vinfólk, ítrótt, áhugamál og trúarlív. Hóast tað er trupult at finna sær ein leigubústað, so er hetta ikki nakað, sum tey ungu tosa nógv um. Tey flestu kunnu, um tey ynskja tað, búgva so leingi hjá foreldrunum sum tey vilja. Tey flestu eru væl nøgd við at hava hendan tryggleikan og flyta einans út, tá tey hava fingið sær egna familju, ella tá tey flyta til Havnar ella av landinum. Ein drongur av Viðareiði fortelur, at hann hevur stóra familju, sum brúkar Facebook at samskifta sínámillum og til at planleggja veitslur o.l. á Viðareiði. Hann hevur eisini vinir á Viðareiði, 'men man møtist ikki so ræðuliga nógv longur'. Men, sigur ein annar drongur av Viðareiði, 'man kann altíð fara til ein kaffimunn hjá fólki her á Viðareiði'. Tú kanst vitja fólk spontant uttan at hava gjørt nakra avtalu frammanundan. Hóast tey ungu fara í skúla aðrastaðni, og harvið eru nógv burturi um dagarnar, sigur hann, so varðveita tey eitt sterkt netverk í bygdini. Nógv av teimum, sum hava gingið á framhalsdeild fólkaskúlans í Klaksvík, hava verið í einum sokallaðum 'bygdaflokki', tvs. at tey hava verið í flokki við ungum av Viðareiði og úr øðrum bygdum í Norðuroyggjum. Her hava tey knýtt bond, sum ofta seta sín dám á teirra sosiala lív í vaksnamannalívinum. Onnur ung hava familjuna á Viðareiði, men vinirnar í Klaksvík. 'Eg kundi funnið uppá at flutt til Klaksvíkar', sigur ein genta av Viðareiði, hóast 'tað er ræðuliga gott stað at vaksa upp, á Viðareiði...so um man fær børn, so hugsar man sikkurt øðrvísi enn nú'. Hon hevur ein dreym um at kanska blíva tannlækni, og so 'kundi man kanska opnað okkurt her...alt er so óvist, men...' Framtíðardreymarnir eru eyðsæð sera ymiskir, men útbúgving og sosialur kapitalur tykist at hava vaksandi týdning fyri arbeiðsmarknaðartilknýti hins einstaka í framtíðini.

> 'The transition from early modern to late modern society took place in the 1980s and 1990s in the Faroes. New educational, social and cultural 'capital' (resources and values) are essential for young adults seeking a job and fortune in life today. Young people with poor educational records and limited or no social network find it increasingly difficult to enter the job market. More than 20% of 24–29-year-olds do not have post-primary education (Manntal 2011) and among young men, the rate is 26%. The educational level is higher in the capital area than in the other regions of the country. There is a tripartite geographical division of the Faroes: Torshavn at the top, the northern region in the middle, and the southern region at the bottom' (Gaini et al 2019)

Heimstaðurin er ein 'comfort zone' sigur ein genta, og hugsar um, at man her kann slappa heilt av og njóta friðin og vøkru náttúruna. Tað heimliga lítla plássið er eyðkent av serligum samanhaldi, siga fleiri ungfólk, men tú ert eisini onkursvegna noyddur at laga teg til lokalu karmarnar. Um tú ikki 'riggar saman við' teimum fólkunum, sum búgva í somu lítlu bygd, so hevur tú ein trupulleika, og tá velur tú kanska at flyta til Klaksvíkar ella Havnar. Nýggir miðlar hava havt ein stóran leiklut fyri ungdómslívið á bygd.

> 'There is a certain comfort for many people who are born and raised in the Faroe Islands that relates directly to the close social and familial ties, and there, finally, we find something of a rub for young people. Until recently, the one major complaint of young Faroe Islanders was the lack of privacy. It was difficult to get away, to have private moments, and everybody seemed to know your business. Then came the Internet and social media, and a very good Wi-Fi structure. Armed with laptops and smart phones, young Faroese can now choose to connect with each other in ways that adults are unable to anticipate, oversee, or coerce' (Aitken 2018: 3)

Og tá ein ungdómur skrivar 'Bygdalív er besta lív' á einum av okkara gulu (post-it) seðlum, so hugsar hann um blíðskap og vinalag, um frið og samanhald, men eisini um tað støðuga og vakra í umhvørvinum, ið hann hoyrir til. Hann minnist góð barnaár og frítt ungdómslív.

# 4. Sosial sambond og felagsskapur

Kenslan av at hoyra til ein felagsskap er sera sterk hjá teimum flestu í Føroyum, bæði í Havn og á bygd. Ein ung kvinna úr Suðuroy, sum er lesandi á Glasi í Havn, fortelur hvussu fólk bera seg at, tá tey frætta hvaðani hon er ættað – 'áh, tú ert suðuroyingur!', siga tey hugtikin og vilja fylgjast við henni. At vera úr Suðuroy, sigur hon, er nakað sera eksotisk í Havn. Fólk úr øðrum pørtum av landinum fáa ikki sama uppmerksemi í Havn, kanska bara uttan tey, ið eru av Sandoynni. 'Tað er líka mikið hvar eg búseti meg', sigur ein annar luttakari úr Havn, sum hevur búð og arbeitt ymsastaðni í landinum. Hann sigur seg vera føroying uttan serligt lokalt tilknýtið. Ein genta úr Havn sigur, at tey ungu vita væl hvar vinir, floksfelagar og onnur fólk, ið tey kenna, koma frá, men 'man leggur ikki so nógv í tað', sigur hon, 'man tosar ikki so nógv um tað'.

> 'Young Faroe Islanders are indeed renegotiating their local identities in relation to values and lifestyles that they learn about through media and social communication. It is a 'glocalization' process, a result of growing local-global interconnectedness, where local identities are reconstructed through dynamic local/global interaction (Kjeldgaard and Askegaard, 2006). This not only influences local space and identities, but also how young people navigate and find their position when they are far away. In this way the home and local identity seem solid at the same time as they are renegotiated and, somewhat, 'hybridized' in relation to global society' (Gaini 2015)

Ein ungur maður úr Havn tosar um kynsmunir í mun til spurningin um staðartilknýti. Vit menn, sigur hann, 'dáma øgiliga væl at bara vera heima...at ikki flyta, at fara í læru...vit vilja vera her...' Hann meinar at kvinnur eru nógv fúsari at pakka saman og flyta, um tær síggja nýggjar møguleikar aðrastaðni. Tær eru, sigur hann, skjótari at leggja sínar útbúgvingarætlanir til rættis. Annars tosa nógv ung eisini um, hvar ið tey ungu hittast. Stóru árligu tónleikafestivalarnir sum eru í Føroyum summarmánaðirnar hava sera stóran sosialan týdning. Ein kvinna sigur: 'Eg haldi at næstan øll tey ungu fara til næstan alt...eg haldi at tey øll kennast nokkso væl...' Býarlívið í vikuskiftunum í Havn er eisini eitt møtipláss hjá nógvum ungum, men tað eru ikki øll sum føla seg drigin at høvuðsstaðnum. Ein ungur fuglfirðingur sigur, at hann allarhelst ikki fer til Havnar: 'mær dámar ikki Havnina...tað er ikki ordiliga eg...mær dámar ikki umhvørvið'. Hesin ungi maðurin sær Havnina sum eitt pláss uttan samleika, uttan nærleika og uttan mentan. Hann fer einans til høvuðsstaðin, um hann er noyddur til tað. Sama havi eg hoyrt onkrar ungar suðuroyingar siga viðhvørt. 'Tað er ov nógv ferð á øllum her, fólk hava ikki tíð til nakað, og alt er ov dýrt...' fortaldi ein ungur lærari úr Suðuroy mær um Havnina einaferð.

**Mynd 6. Hvat dámar tær at búgva í tínum býarparti?**




Kelda: úr frágreiðingini The Nordic Youth Research 2010

Í Føroyum hava vit eina familjuskipan, ið minnir um hana, ið er í útjaðaraøkjum í Noregi, Danmark og Íslandi. Nógv fólk kenna ikki bara foreldur og systkin síni, men hóp av øðrum skyldfólkum, ið mangan eisini búgva í grannalagnum ella í minsta lagi sama býi ella somu bygd. Ein høvuðsorsøk til at familjurnar halda saman er hin landafrøðiligi nærleikin, sum ger tað møguligt at hittast javnan. Annað, sum ger seg galdandi her, er, at vit í Føroyum samtíðis hava eitt sera framkomið og fjøltáttað samfelag og gomlu bygdamentanina, ið hevur djúpar røtur í fólkinum.

**Mynd 7. Um tú hevði eitt barn nú – hevði tú viljað at barnið vaks upp í býarpartinum sum tú býrt í nú?**




Kelda: úr frágreiðingini The Nordic Youth Research 2010

Føroyska familjan er rættiliga demokratisk á tann hátt, at børn og vaksin, kvinnur og menn, hava sera óformlig og vinarlig bond sínámillum, ið forða fyri sterkum stigskipaðum familjuskipanum. Familjan er ein felagsskapur við næstan javnsettum limum. Fáar avmarkingar verða settar teimum yngstu, og børn luttaka í flestu ítrivunum, ið foreldrini takast við. Børn verða ikki krógvað burtur ella sett til viks í trygga frástøðu frá vaksnum persónum. 'Tað er jú *bara* børn', verður ofta mælt í verju barnanna ímóti uppíblanding og revsing frá vaksnum.

'En barndomspolitik vil ikke kunne løse alle problemer. Men en institutionalisering af den vil have signalværdi – og der vil utvivlsomt skulle kæmpes for, at det skal blive mere end en symbolsk gestus. Det har været sagt, at "hvad der er godt for familien, er også godt for børnene". Det er der sikkert meget rigtigt i. Men det omvendte er sikkert lige så rigtigt: "hvad, der er godt for børnene, er godt for familien"' (Qvortrup 1994: 180)

Nógv ung ætla sær at flyta úr heimbygdini ella heimbýnum tá tey verða vaksin, til dømis í sambandi við víðari lestur, men tey flestu ynskja at flyta heimaftur seinni.

Fólk liva framvegis 'lokalt' við einum gerandislívi, ið í høvuðsheitum gongur fyri seg á neyvt avmarkaðum landaøki. Kollektivir samleikar, sum eru knýttir at landafrøðiligum plássi, sigur Gry Paulgaard, 'might represent a sense of security and an attempt to "fix the flow" and mark boundaries in the ongoing globalization process' (Paulgaard 2002: 104). Vaksandi globalisering, sigur hon, gevur spurninginum um lokalan samleika ein nýggjan týdning. Vit hava sæð, at ungir føroyingar hámeta sítt frælsi at flyta og at velja, hvar ein vil búgva, men samstundis gera tey nógv fyri ikki at missa sambandið við familjuna og heimstaðin.

**Talva 1: Ung í Føroyum siga hvussu stórt álit tey hava á stovnum í samfelagnum**

| Hvussu stórt álit hevur tú á hesum stovnum? (N) | heilt stórt | nokk so stórt | nokk so Lítíð | heilt Lítíð | tils. |
|---|---|---|---|---|---|
| Kirkjuni | 157 | 187 | 95 | 89 | 528 |
| Fólkaskúlanum | 94 | 281 | 112 | 43 | 530 |
| Dómstólunum | 125 | 229 | 101 | 64 | 519 |
| Løgregluni | 188 | 211 | 82 | 47 | 528 |
| Løgtinginum | 49 | 155 | 185 | 134 | 523 |
| Landsstýrinum | 49 | 167 | 184 | 122 | 522 |
| Fjølmiðlunum | 27 | 162 | 208 | 115 | 512 |
| Heilsuverkinum | 129 | 262 | 83 | 45 | 519 |
| Bankunum | 114 | 235 | 122 | 53 | 524 |
| Stórfyritøkum | 61 | 245 | 163 | 49 | 518 |
| Handils- og tænastufyritøkum | 69 | 272 | 138 | 39 | 518 |

Kelda: úr frágreiðingini Ung í Føroyum 2012

Sum partur av siglingartjóð hugsa føroyingar flest um, *nær* tey skulu flyta burtur heldur enn at hugsa um, *hvørt* tey skulu flyta ella ikki. At fara burtur eina tíð, uttan nakað serligt hóvasták, verður roknað sum innløga av mentanarligum kapitali, eitt tiltak, ið betrar tíni framtíðarútlit í Føroyum. Tey ungu tosa opið um sínar flytiætlanir uttan at smæðast. Vanligastu frágreiðingarnar um orsøkina til at flyta burtur eru knýttar at útbúgving og arbeiði, men einhvør kann hava sínar persónligu orsøkir til at flyta burtur frá tí heimliga og kenda eina tíð. Tey ungu kunnu altíð hála 'akkerið' upp og venda heim, um nakað skuldi gingið galið. Við 'akkerinum' undir hond, kunnu vit siga, er ikki nógv at missa, tá tú ert í útlegd. Vit síggja, at ungir føroyingar hámeta sítt frælsi til at flyta – sítt frælsi til sjálvir at velja, hvar teir skulu búgva – men samstundis síggja vit, at føroyski ungdómurin varliga og tilvitað tryggjar seg ímóti at missa tilknýtið til familjuna og heimið.

# 5. Hvørjum eru ung stolt av í sínum lokalsamfelagi

Hóast tey ungu hava fjøltáttaðar meiningar um ungdómslívið og gerandisdagin á heimsstaðnum, um góðar og minni góðar síður av býnum ella bygdini, ið tey hoyra til, so eru tey ógvuliga tilvitað um tað, ið kann sigast at skapa eina jaliga mynd av staðnum. Spurd hvat tey meta at vera eyðkenni fyri teirra heimpláss, viðurskifti sum eru við til at geva teimum eina kenslu av at 'hoyra til' og vera partur av lokala 'felagsskapinum', kemur nógv forvitnisligt fram. Hvør luttakari skrivaði nøkur orð, sum hann metti at vera serliga týðandi fyri seg, á ein pappírslepa, sum eg síðan savnaði saman. Nógv orð ganga aftur. Her er eitt yvirlit yvir orðini, sum vit savnaðu saman:

**Talva 2: Tankar hjá teimum ungu um síni heimpláss**

| Gulir (Post-it) seðlar av Viðareiði | Gulir (Post-it) seðlar úr Fuglafirði | Gulir (Post-it) seðlar úr Tórshavn |
|---|---|---|
| Góðan felagsskap | Sosial sambond | Ítróttur |
| Góðar umstøður | Ítriv | Arbeiði |
| Familjan vinir | Rógving (ítrótt) | Frítíð |
| Tryggleiki | Øll heilsa uppá øll | Vinir |
| Náttúran | Friðarligt | Familja |
| Heimligt | Vinaligt | Sjólívið |
| Samanhald | Tryggleiki | Tryggleiki |
| Eitt heim | Fólk eru blíð og kenna hvønn annan | Sosial inklusjón |
| Kennir øll | Bygdarlív er besta lív | Frí rættindi |
| Friðarligt/ró | Náttúran | |
| Friður (bæði so og so) | Samanhald | |
| Náttúruvernd | Bóndalív | |
| Góð barnaár | Friður og blídni | |
| Góðan skúla | Blíðskapur | |
| Tætt samband | Familja og vinir | |
| | Kenna grannan | |

Vit síggja her, at ung í Havn skriva færri orð enn hini, og eisini um eitt sindur øðrvísi tema – t.d. frí rættindi, inklusjón og arbeiði. Tey ungu á bygd nevna t.d. góð barnaár, góðan felagsskap, tað heimliga og tætt samband (millum íbúgvar). Alt hetta er við til at styrkja teirra tilknýti, bæði í fortíð og framtíð, til plássið. Friðurin og tryggleikin verður eisini tikin fram, bæði á Viðareiði og í Fuglafirði, og endurspeglar tankar um, hvat ið onnur kanska sakna og søkja. Familjan og vinirnir eru týðandi fyri øll, líkamikið hvar í landinum tey eru stødd. Tey ungu uttan fyri høvuðsstaðin nevna eisini náttúruna sum nakað, ið tey bæði brúka og verða formað av. Frítíð og ítriv (t.d. ítróttar- og tónleikafeløg) hava týdning á stóru plássunum, men verða ikki beinleiðis nevnd av ungum viðingum. Uttan fyri høvuðsstaðin tosa tey ungu eisini um at 'kenna øll' og um at 'øll heilsa uppá øll', og

júst hetta er kanska ein av høvuðsmununum á Havnini og bygdunum kring landið. Havnin er ikki nakar stórbýur, men samskiftið millum fólk tykist vera fullkomiliga øðrvísi enn á bygd, av tí at fólk hittast í almenna rúminum uttan at heilsa uppá hvønn annan.

Meðan vit høvdu fokusbólkasamrøður vórðu ungu luttakararnir eisini bidnir um at seta nakrar krossar (klisturmerki í ymsum litum) í eina talvu. Her vóru fimm spurningar, sum umrøddu fimm ymisk evni í kanningini. Vegna eina misskiljing, so var tann fimti spurningurin svaraður á aðrari talvu í Havn og í Fuglafirði. Sostatt eru øll úrslitini ikki at finna í høvuðstalvuni niðanfyri. Tey eru tó tikin við, bara á separatum talvum.

**Talva 3: Hvat siga tey ungu um høvuðsspurningarnar í kanningini hjá okkum?**

| | Tórshavn | Fuglafjørður | Viðareiði |
|---|---|---|---|
| 1 | YY HHHHH | | |
| 2 | H | | RRR |
| 3 | Y | | RR |
| 4 | | | R |
| 5 | YYY | GGG | Y |
| 6 | G | GG HH | Y |
| 7 | G | H | YY |
| 8 | | YY HH | GGG YY |
| 9 | RR | Y R | B HHHH GGG |
| 10 | GGGG RRRR | YY RRRR | BBBBB HH |

| | |
|---|---|
| G | hvussu nógv av tí, ið tú ynskir at gera, kanst tú gera? (10=alt) |
| R | sleppur tú at vera við til at avgerða, t.d. tá okkurt skal broytast í lokalsamfelagnum? (10=fullkomiliga) |
| H | ert tú nøgd(ur) við stuðulin, sum vaksin fólk í lokalsamf. kunnu veita tær? (10=fullkomiliga) |
| Y | heldur tú at onkur hevur havt fordómar um teg, og at tú hevur verið fyri órættvísari viðferð? (10=als ikki) |
| B | kennir tú teg sum ein part av størri felagsskapi – t.d. Føroyar sum land ella netforum? (10=heilt greitt) |
| B | úrslitini fyri Tórshavn og Fuglafjørð eru at finna á talvunum niðanfyri! |

Viðvíkjandi spurningi R, so sæst, at ung á Viðareiði eru minni nøgd enn ung aðrastaðni. Tey tykjast tó ikki at síggja hetta sum nakran stóran trupulleika. Ung úr Havn eru meira neilig enn hini, tá vit hyggja nærri at úrslitunum av spurningi H. Tey eru, við øðrum orðum, ikki nøgd við stuðulin, sum tey kunn fáa frá vaksnum persónum, ið tey hava samband við í lokalsamfelagnum. Fá ung í landinum kenna seg hava verið fyri órættvísari viðferð (Y) serliga ofta. Spurningurin um samleika (B), at kenna seg sum ein part av einum størri felagsskapi, er áhugaverdur, og úrslitini eru at finna í trimum talvum. Ung av Viðareiði hava ein sterkan lokalan samleika – øll í bólkinum kenna seg sum Viðingar og føroyingar.

**Talva 4: Tórshavn: B spurningur (hvør litur umboðar ein luttakara)**




Ung í Havn hava eisini eitt sterkt tilknýti til høvuðsstaðin, hóast tað eru nøkur, sum eru uppvaksin aðrastaðni, og sostatt eisini hava sosialt og mentanarligt tilknýti til onnur lokalsamfeløg í landinum. Allir luttakararnir í kanningini eru føroyingar við sterkum tilknýti til landið og mentanina.

**Talva 5: Fuglafjørður: B spurningur (hvør litur umboðar ein luttakara)**




Ung í Fuglafirði hava eisini ein sera sterkan lokalan samleika, sambært úrslitinum í talvuni omanfyri, men Eysturoyggin sum pláss hevur lutfalsliga lítlan týdning fyri mentanarliga samleikan hjá fuglfirðingum. Eisini sæst, at fá hava serligt tilknýti til aðrar 'felagsskapir' enn teir, ið hava serligt 'landaøki'. Eins og á hinum plássunum, so eru allir luttakararnir føroyingar við sterkum tjóðsamleika.

# 6. Tilmæli

Mælt verður til at orða ein almennan barna- og ungdómspolitikk fyri landið, ið skal tryggja børnum og ungum bestu kor og umstøður at vaksa upp og mennast, men eisini at hava ávirkan á mentanarlig og samfelagslig viðurskifti. Haraftrat skal politikkurin forða fyri, at veikir ungdómsbólkar verða marginaliseraðir og ekskluderaðir.

Mælt verður til miðvíst at savna saman vitan og hagtøl um ung, ið kunnu geva okkum betri innlit í kor og umstøður hjá ungdóminum í landinum. Samstarv millum ungdómsgranskarar, ungdómsfelagsskapir og lokalar politiskar aktørar eigur at mennast við framleiðslu av felags ungdómsverkætlanum og frágreiðingum, seminarum og fundum í huga. Tey ungu sjálvi eiga at hava ein virknan leiklut í hesi tilgongdini – sum luttakarar, ráðgevar, samskiparar og eftirmetarar.

Mælt verður til, at ung fáa eina skipaða frálæru í politiskari luttøku og inklusjón á framhaldsdeild fólkaskúlans. Frálæran skal vera praktisk og leggja dent á føroysk viðurskifti og hava grundarlag í vísindaligum kanningum og frágreiðingum. Hon skal eisini hava ein norðurlendskan kontekst, har hugt verður nærri at arbeiðinum við at inkludera ung í samfelagið í grannalondum okkara í dag.

Mælt verður til fáa meira tilfar um ung í almennar miðlar – sjónvarp, útvarp og alnet. Her eiga ung úr øllum samfelagsbólkum at fáa møguleika at fortelja sína søgu og at samskifta við aðrar ungdómsbólkar. Her eiga spurningar um rættindi og luttøka í samfelagnum at takast upp til kjaks, ikki minst í mun til landafrøðiligar munir (bygd/bý) í Føroyum. Ung eiga at hava ein týðandi leiklut í framleiðslutoyminum.

# Heimildir


Aagre, W. 2014. Ungdomskunnskap – hverdagslivets kulturelle former (2.útg.) Bergen: Fagbokforlaget

Aitken, S.C. 2018. Young People, Rights and Place. Oxon: Routledge. https://doi.org/10.4324/9781315519258

Bamford, A. 2012. Arts and Cultural Education in the Faroe Islands. Tórshavn: Norðurlandahúsið í Føroyum

Gaini, F. 2008. Miðlar, mentan og seinmodernitetur. Ein antropologisk lýsing av føroyskum ungdómi. Tórshavn: Faroe University Press

Gaini, F. 2008. Barna og ungdómskanning – mentan, frítíð og trivnaður. Torshavn: Mentamálaráðið

Gaini, F. 2009. Altjóða sáttmálin um barnarættindi. Í Greinasavn um Sameindu Tjóðir og Mannarættindi. Tórshavn: Amnesty International

Gaini, F. 2012. Ung í Føroyum 2012 (Útbúgving, mentan, ítróttur, frítíð og trivnaður). Úrslit av spurnakanning í 9. flokkum. Torshavn: Fróðskaparsetur Føroya

Gaini, F. 2015. Wherever I Drop Anchor. Faroese Teenagers' View on Home and Migration. Fróðskaparrit vol. 62. Tórshavn: Faroe University Press. https://doi.org/10.18602/fsj.v62i0.22

Gaini, F. 2018, Altered Islands: Young Faroe Islanders' Future Landscapes. Suomen Antropologi, vol. 43(4). https://doi.org/10.30676/jfas.v43i4.73270

Guðmundsdóttir, M.L., Sigfússon, J., Kristjánsson, A.L., Pálsdóttir, H. og Sigfúsdóttir, I.D. 2010. The Nordic Youth Research 2010. A comparative research among 16 to 19 year old students. Reykjavík: ICSRA (University of Reykjavik)

Grumsøe, S.P. 2017. Den gode barndom. Keypmannahavn: Hans Reitzels Forlag

Hayfield, E. A. 2017. Exploring the transnational realities in the lives of Faroese youngsters. *Nordic Journal of Nordic Research,* vol. 7(1). https://doi.org/10.1515/njmr-2017-0007

Karlsdóttir, A. og Jungsberg, L. 2015 Nordic Arctic Youth Future Perspectives. Stockholm: NORDREGIO

Karlsdóttir, A., Cuadrado, A., Gaini, F., and Jungsberg, Leneisja. 2019. Enabling vulnerable youth in rural areas not in education, employment or training. Nordregio Report 2019(8). Stockholm: NORDREGIO. https://doi.org/10.6027/R2019:8.1403-2503

Paulgaard, G. 2002. Local identities in a 'globalised world'. Young vol. 10 https://doi.org/10.1177/110330880201000307

Qvortrup, J. 1994. Børn halv pris. Nordisk barndom I samfundsperspektiv. Esbjerg: Sydjysk Universitetsforlag

Skaale, S. 2013. Hvat er tað, sum dregur? Lýsing av hví nýútbúnir føroyingar frá 2008-2012 búsettu seg har teir gjørdu. Keypmannahavn: Javnaðarflokkurin á Fólkatingi

Thomson, P. 2008. Doing Visual Research with Children and Young People. Oxford: Routledge. https://doi.org/10.4324/9780203870525

Tjaldrafløtti, B., Blåsvær, J., Samuelsen, B. og Johansen Á. (ritstj.) 2007. Visjón 2015. Mál og Vegir. Tórshavn: Løgmansskrivstovan

Tórshavnar Kommuna. 2006. Álit um ung í Tórshavnar Kommunu. Torshavn: TK

Valentine, G., Skelton, T. og Chambers, D. 1998. Cool Places. An Introduction to Youth and Youth Cultures. Í Skelton, T. og Valentine, G. (ritstj.) Cool Places. Geographies of Youth Culture. London og New York: Routledge

# English summary

In the Faroe Islands, the question of youth participation and inclusion is rarely discussed among politicians and scholars. In this project, based on three focus group interviews (conducted late in the spring 2019) in a small village, a large town and the capital city, young people were offered the opportunity to discuss a string of key topics regarding their rights, social life and participation in local community. The capital Torshavn has more than 16.000 inhabitants (the municipality has 21.500 inhabitants), Fuglafjørður has 1.500 inhabitants, and Viðareiði has 340 inhabitants.

Young Faroe Islanders are generally well-satisfied with their situation at home and in local society. They have busy everyday lives with school, work, sports, chores, friends, etc. Young people, especially outside of the capital Torshavn, have an everyday life with a high degree of mobility in the form of regular work-, school- and leisure-oriented movement between towns and villages. Their networks have a large geographical and social scope, but the sense of (emotional) attachment to place – the home village – seems to be very solid and resilient. The family ties represent the most important indicator of their local identity. Torshavn is larger and more diverse, with many young people moving in from smaller communities all over the Faroes; it represents a more "deterritorialized" urban place with groups of people not having much contact to each other.

Young people generally feel included and respected in their families (households) and local communities. At home, says a boy from Fuglafjørður with a smile, "I can do whatever I like, almost…except of burning down the house". While most young people don't participate directly in local politics, and don't feel that politicians from their local community really focus on the youth, they still seem confident that their representatives will not work against the common interests of the community. "The one who is elected to the local municipality", says a young woman from Viðareiði, "is often the one who has the largest family network…he knows many people and thus gets the votes' And, she adds, "then it is not necessarily because you are intelligent and skilled, but more because you have a large family…" While young people might be quite invisible in local politics, they know exactly what is going on in their community. Informally, on the street corner or in social media, they participate in discussions about local politics.

At first glance, they seem quite passive, but are, in fact, very well informed about the political landscape and decision-making processes in their local community. With a laid-back attitude, they trust that the political class would not put their inclusive and egalitarian communities at risk. In a family-oriented small-scale society people depend on each other, and everyone knows everything about everyone else, so to speak, which is a condition giving young people a sense of being part of the game even when they keep a low profile in local societal discussions. Young people are, on the other hand, very active in their everyday lives: school/education, leisure/sports, work, etcetera.

Young Faroe Islanders express a strong (emotional) attachment to the place they call home. Most young people live in their parents' homes, because it is a cheap solution, yet also because of the lack of alternative housing offers in the local community. Most young people have large family networks and are connected to people from different social groups through their friendships, sports activities, religion communities, etc. While it can be very hard to find a rental, this is not a topic that young people talk much about. Most people do not feel any urge to move out of their parents' house before they get their own family or move (far) away from the home village or town. The home village, says a girl, is a "comfort zone", a place where you can totally relax and enjoy the peace and beautiful nature. There is special social connection between people in a small village, young people emphasize, and individual men and women need to "fit in" and "match" the culture of the place. If you don't adapt and conform to the local "way of life" and norms, it might be difficult to stay in the village.

What we see is that young Faroe Islanders appreciate their freedom to move and to decide where to live, but at the same time they carefully avoid losing their attachment to the family and home

My recommendations, based on this study from the Faroe Islands, can be summarized in these four goals:

To define and implement a national policy for children and youth in the Faroe Islands which shall secure the best conditions and options for young people to grow up and develop but also to have an influence on cultural and societal issues. Also, the policy shall prevent vulnerable youth groups from becoming marginalized and excluded in society.

To systematically gather and organize knowledge and statistical data about young people which can help us get better comprehension of the conditions and options of young people in the Faroe Islands. Strategic collaboration between youth researchers, youth associations and local political institutions shall be advanced with common reports, seminars, meetings, etc.

To establish a structured programme in political participation and social inclusion in lower secondary school. The course shall be research-based and practice-oriented with focus on the Faroese context. It shall also have a Nordic dimension, looking at the lessons (concerning inclusion of youth) from neighbouring countries today.

To produce more information about and fora for youth in public media – television, radio, Internet. Here, young people from all layers of society shall get the opportunity to tell their own stories and engage in conversation with other young people. The question about rights and participation in society should be the main focus of all activities.

**Norðurlandaráði**
**Nordens Hus**
**Ved Stranden 18**
**DK-1061 København K**
**www.norden.org**

**NABO – røddir frá ungum um sosiala inkludering í Føroyum**
Nabo er ein verkætlan sum var sett í gongd í Nørrøna ráðharraráðnum undir tí svenska formannaskapinum í 2018. Svenski myndugleikin *Myndigheten för ungdoms- och civilsamhällesfrågor* stjørnar fyri verkætlanani í tíðarskeiðinum 2018–2020. Hon hevur sum mál at lýsa ungdómssjónarmið á sosiala inkludering gjøgnum røddir frá ungum í Norðurlondum. Røddir teirra ungu verða hoyrdar í spurningum sum handla um teirra egna lív. Grundað hesa vitan fáa tey møguleika at luttaka í og ávirka politiskar avgerðir.

Ung verða biðin um at lýsa sín gerandisdag og siga frá, hvørjar møguleikar og forðingar tey uppliva at tey hava. Úr frásøgnunum byggir Nabo vitan um hvørji viðurskifti sum menna sosiala inkludering í Norðurlondum.

Hendan frágreiðing byggir á samrøður við ung í fokusbólkum á ymiskum plássum í Føroyum.

Líknandi kanningar eru verksettar í øllum Norðurlondum og í Grønlandi och Álandi.